## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin og leygardagin:**
Fleyr til gul av landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 6 og 10 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum, turt og sólglottar. Hitin millum 7 og 10 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 6 og 10 stig.

# Eitt satt listaverk úr frukt

**Við hátíðarhaldið hjá Eik Banka í sambandi við útgávuna av Eikirøtur, stóð eitt satt listaverk úr frukt til prýðis í hølunum**

LISTAVERK
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Listaverk er so mangt.

Ofta eru listaframsýningar, har tú øtast við, at slíkt verður kallað list. Hetta kemur sjálvandi ikki so ofta fyri í Føroyum, men er púra vanligt í útlandinum.

Eitt ikki so gamalt dømi var, tá ein danskur listamaður sýndi fram gullfiskar í blendarum. Tað rópti hann púra ósmæðin fyri list.

Men verkið, ið mongu gestirnir kundu skoða á móttøkuni hjá Eik Banka í sambandi við at søgan um bankan varð handað Eikgrunninum í bók, var verulig list.

Tað var alsikki beinanvegin, at tú varnaðist, at listaverkið var útskornar fruktir. Har vóru kanariufuglar, blómur úr gularótum og svanar úr súreplum. Og so var heitið á bókini skorið út úr einari vatnmelón og árstølini 1832 og 2007 skorið út á aðrari.

Hetta var ótrúliga hugtakandi og vakurt, sonn list.

Sum skiltist er tað ein tailensk, føroyskt gift kvinna, sum hevði skapt listaverkið.




*Ótrúliga vakurt vóru fruktirnar útskornar*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 2 |
| Nuuk | 0 |
| Qaqortoq | 6 |
| Ammassalik | 5 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 9 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | 1 |
| Lerwick | 9 |
| Aberdeen | 10 |
| London | 19 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 12 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 12 |
| Keypmannah. | 13 |
| Helsinki | 7 |
| Moskva | 8 |
| Berlin | 16 |
| Warzawa | 15 |
| Kiev | 12 |
| Bukarest | 21 |
| Paris | 25 |
| Madrid | 18 |
| Róm | 19 |
| Malorca | 20 |
| Athen | 21 |
| Malta | 21 |
| Tunis | 20 |
| Beijing | 21 |
| New Dehli | 22 |
| Bangkok | 28 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 20 |
| New York | 19 |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 17 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 30 |
| La Paz | 9 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 21 |

### LUFTTRÝSTIÐ



**Í gjár:**
Eitt hátrýst, 1021 hPa. skamt í útsynning úr Føroyum viknar. Eitt veikt lágtrýst, 1012 hPa. eystan fyri Ísland fer í landsynning eystan og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum hóskvøldið.



**Í dag:**
Lágtrýstið yvir Suður~Svøríki fer spakuliga eystureftir og vestan fyri lágtrýstið rekur køld luft av landnyrðingi móti Føroyum

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 13/5 kl. 06[00] – 14/5 06[00]. Hitin í gjár: 10,4°
Minsti hiti máldur í mai: -9,9° - Mesti hiti máldur í mai: 18,3°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 13/5 kl. 06[00] – 14/5 06[00].
Avfallið higartil í mai: 15 mm




I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 6. mai | Mánin næstur jørðini |
| 12. mai | Fyrra kvarter |
| 20. mai | Fullmáni/ Mánin longst frá jørðini |

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 15. mai | 4:09 | 16:28 | 3:09 | 15:28 | 3:24 | 15:43 | 6:09 | 18:28 | 7:09 | 19:28 | 2:24 | 14:43 | 1:24 | 13:43 | 4:24 | 16:43 | 5:24 | 17:43 | 3:54 | 16:13 | 5:09 | 17:28 |
| 16. mai | 4:48 | 17:08 | 3:48 | 16:08 | 4:03 | 16:23 | 6:48 | 19:08 | 7:48 | 20:08 | 3:03 | 15:23 | 2:03 | 14:23 | 5:03 | 17:23 | 6:03 | 18:23 | 4:33 | 16:53 | 5:48 | 18:08 |
| 17. mai | 5:28 | 17:48 | 4:28 | 16:48 | 4:43 | 17:03 | 7:28 | 19:48 | 8:28 | 20:48 | 3:43 | 16:03 | 2:43 | 15:03 | 5:43 | 18:03 | 6:43 | 19:03 | 5:13 | 17:33 | 6:28 | 18:48 |
| 18. mai | 6:09 | 18:28 | 5:09 | 17:28 | 5:24 | 17:43 | 8:09 | 20:28 | 9:09 | 21:28 | 4:24 | 16:43 | 3:24 | 15:43 | 6:24 | 18:43 | 7:24 | 19:43 | 5:54 | 18:13 | 7:09 | 19:28 |
| 19. mai | 6:52 | 19:15 | 5:52 | 18:15 | 6:07 | 18:30 | 8:52 | 21:15 | 9:52 | 22:15 | 5:07 | 17:30 | 4:07 | 16:30 | 7:07 | 19:30 | 8:07 | 20:30 | 6:37 | 19:00 | 7:52 | 20:15 |